


www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 10 - 2012

# Statoil ger innrás í bretskt øki

Nú teir bretsku myndugleikarnir útlutaðu leitiloyvi í sambandi við ta 27. útbjóðingina, fekk norska Statoil part av sjey loyvum, harav felagið skal verða fyristøðufelag í tveimum. Statoil hevur ikki verið serliga virkið í bretskum øki, so talan er í roynd og veru um eina innrás. Nick Maden, sum er leiðari á altjóða leitideildini hjá Statoil, sigur, at tey góðu leitiúrslitini, sum hava verið á norskum øki í seinastuni, vísa, at tað eru framvegis stórir møguleikar í Norðsjónum. Hann leggur afturat, at tey nýggju loyvini geva Statoil eina betri støðu í áhugaverdum leitiøkjum. Teir 19 blokkarnir, sum bretar útlutaðu í hesum umfari, eru í Norðsjónum og vestan fyri Hetland. Tey bæði føroysku feløgini, Atlantic Petroleum og Faroe Petroleum, fingu væl burtur út útlutingini.